# Vit ganga stovninum ov nær

*Høvuðsorsøkin til, at útflutningurin fyrsta ársfjórðing er minkaður í mun til í fjør, er stutt og greitt tann, at vit hava fiskað ov nógv*

EDVARD JOENSEN

Føroyingar hava verið ov effektivir at fiskað. Vit hava fiska meira enn tað, fiskifrøðingarnir siga vera langtíðarforsvarligt. Úrslitið er, at fiskastovnarnir eru troyttir meira, enn teir tola, og eru í minking. Av tí sama verður minni at fáa, og útflutningurin minkar heilt natúrliga, sigur Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni.

Í Hagtíðindi fyri mai mánað verður sagt, at útflutningurin fyrstu tríggjar mánaðarnar í ár er minkaður í nøgd við 18% í mun til somu tíð í fjør. Hinvegin er virðið vaksið av tí, at fiskaprísirnir hava verið heilt óvanliga góðir.

At fiskinøgdin minkar er einki løgið, heldur Petur Steingrund. Hann sigur, at nú stovnsmetingarnar eru gjørdar, vísa tølini, at toskastovnurin aftur er komin á tað vanliga minstamarkið. 20.000 tons. Í 1996 var talið heili 40.000 tons, meðan tað fyrrapartin av nítiárunum var nógv lægri. Tað var eisini »katastrofalt« tá og førdi til ta ringastu kreppuna, vit vita um.

Fiskifrøðingarnir tosa um vanligt maksimum og vanligt minimum. Hesi tølini eru fyri toskastovnin ávikavist 40.000 og 20.000 tons. Og stovnurin er í løtuni á vanligum minimum, sum er 20.000 tons, sigur Petur Steingrund.

Svikaligt er, og endurtekur støðan frá fyrru helvt av nítiárunum seg, verður sama neyðin aftur, sum tá var.

Hýsustovnurin er eisini skjótt á veg niðureftir. Hýsan hevur verið rímiliga væl fyri, men er nú á leið mitt í millum vanligt minimum og maskimum, men sum sagt í minking.

Upsastovnurin er hinvegin á veg uppaftur. Hann hevur í fleiri ár verið á minimum, sum er gott 20.000 tons, men er nú komin upp aftur um tey 30.000 tonsini, sigur Petur Steingrund.

Tilráðingin frá fiskifrøðingunum fyri fiskiskapin í ár er ikki komin enn, men er væntandi hvørja løtu. Í fjør kom hon fyrstu vikuna í juni. Petur Steingrund dugir ikki at siga nakað um, hvat fer at standa í henni, men sum útlitini eru í løtuni, kann væntast, at hon verður varlig. Helst fara teir at mæla til ávísan niðurskurð, metir hann.

Petur Steingrund sigur, at vit hava havt serliga góðar umstøður til fisk seinastu árini. Toskaárgangirnir í 1992 og 1993 vóru heilt serligir, eins og vit eisini høvdu ein rættiliga góðan árgang í 1997. Men vit hava ikki klárað at umsitið hesar ordiliga, og nú er stovnurin á veg niðuraftur.

Fiskifrøðingarnir brúka tølini frá 1961 til í dag at rokna út, hvat teir meta vera tilráðiligt at fiska. Og sum vit hava fiskað undir Føroyum, eru vit væl oman fyri tað, teir nevna »langtíðarforsvarligt«.

Tá nógvur fiskur er til, sum tað hevur verið seinnu árini, ber nógv til. Og soleiðis hava vit fiskað. Sum alt bar til. Men nú fer at ganga undan aftur, og so standa vit har við ov stórari veiðiorku, sigur Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni.



*Føroyingar hava verið ov raskir at fiska, og tað tola stovnarnir ikki, siga fiskifrøðingarnir*
**savnsmynd**

# Regin nýggjan høvuðsstuðul

*Formula.fo er nýggjur høvuðsstuðul hjá Regini Vágadal. Avtalan varð undirskrivað týsdagin og er galdandi fyribils eitt ár við møguleika fyri leingjan*




*Óli Hansen, stjóri í Formula.fo og Regin Vágadal skrivaðu týsdagin undir stuðulsavtaluna*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

EDVARD JOENSEN

Formula.fo og Regin Vágadal hava gjørt nýggja høvuðsstuðulsavtalu. Regin Vágadal og Óli Hansen, stjóri á Formula.fo, skrivaðu týsdagin undir avtaluna, sum ber í sær, at Formula.fo verður høvuðsstuðul hjá Regini Vágadal hetta fram til 1. mai komandi. Møguleiki er tó fyri at leingja avtaluna, um partarnir verða samdir um tað. Formula.fo hevur forrætt til at samráðast um nýggja høvuðsavtalu.

Partarnir eru ikki sinnaðir at nevna nøkur tøl í sambandi við ta nýggju høvuðsstuðulsavtaluna.

Nýggja avtalan hevur við sær, at Regin Vágadal fer at kappast við búmerkinum hjá Formula.fo á búnanum. Eisini á venjingarbúnunum fer at standa Formula,fo.

Og tað kann føra Formula.fo rímiliga víða, tí Regin er kendur úti í heimi millum aðrar ítróttarmenn í heimsflokki. Saman við fótbóltslandsliðnum er Regin okkara kendasti ítróttarmaður úti í heimi. Til dømis kan nevnast, at bara við Atlantic Giant var Regin Vágadal í 1998 heilar 15 ferðir í Eurosport, meðan hann gavst at telja, tá hann var komin til níggju ferðir í fjør.

Í ár er Regin í ferð við at venja til serliga tvær stórar kappingar. Í juni mánaði skal hann til Hollands at kappast um at gerast sterkasti maður í Europa, og í august er heimsmeistarakappingin í Sun City í Suðurafrika. Regin Vágadal hevur fyrr nevnt, at hann ætlar at verða heimsin sterkasti maður í ár. Nú er møguleikin, og hann sigur, at hann kennir seg betri fyri, enn tá hann gjørdist nummar tvey í Atlantic Giant kappingini.

Um ta kappingina sigur Regin, at tað verður framvegis arbeitt við at fáa hana aftur í ár. Men Sjónvarp Føroya fer ikki at keypa nøkur rættindi til hana. Tó hevur SvF játtað at taka hana upp.

Hendan nýggja avtalan, sum nú er gjørd, gevur eisini Formula.fo møguleika til at nýta Regin Vágadl í lýsingarhøpi. Formula.fo umboðar millum annað samtakið Fujitsu Siemens, sum teir nevna nýggja KT-risan. Og júst hetta hevur givið íblástur til at gera avtalu við Regin Vágadal, sum jú eisini er ein risi á mangan hátt. Aðrir stuðlar hjá Regini eru Føroya Fiskasøla, Atlantsflog og Mjólkarvirki Búnaðarmanna.

Annars hevur Regin Vágadal gjørt sær nýggja heimasíðu, sum verður klár fyrsta dagin. Hon hevur bara bíðað eftir, at allar stuðulsavtalurnar eru komnar upp á pláss. Adressan verður:

www.regin-vagadal.com



Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team 85 · 31 65 11

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



**Gisting á hotelli**
úr einans ...
(í lágárstíð) **864,-** fyri hvønn



**Gisting á vallaraheimi**
úr einans ...
(í lágárstíð) **691,-** fyri hvønn



**Privat gisting**
úr einans ...
(í lágárstíð) **819,-** fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

*Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu*

*Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.*



**Ring og hoyr nærri !**

e-mail: booking@smyril-line.fo

# Oslo takkar Ernu og Njál

*Seinnapartin í gjár takkaði borgarstjórin í Oslo, Per Ditlev-Simonsen, føroysku hjúnunum, Ernu og Njál Djurhuus, fyri teirra arbeiði millum tey illa støddu í býnum. Tey fingu handað St. Hallvard-heiðursmerkið, ið er hægsta heiðurstekin, sum býurin kann geva nøkrum*



*Erna og Njál fingu seinnapartin í gjár St. Hallvards-heiðursmerkið sum takk fyri arbeiðið, tey hava gjørt millum gøtufólkini í norska høvuðsstaðnum.*
**Mynd: Vårt Land**

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Undir eini samkomu í býráðshøllini í Oslo seinnapartin í gjár fingu Erna og Njál Djurhuus handað St. Hallvard-heiðursmerkið fyri arbeiði sítt innan Frelsunarherin í býnum. Tey fingu heiðurmerkið fyri tann sera virðismikla leiklutin, tey hava havt fyri býin tey árini, tey hava verið her.

Her hava tey bæði í umleið fimtan ár arbeitt í Urtegata, har Frelsunarherurin hevur Urtegatas Fyrlyskorps.

Her koma fólk, sum eingin annar vil kennast við: Alkoholikarar, evnismisnýtarar og tey, sum ikki megna at liva í tí norska kappingarsamfelagnum.

St. Hallvard er verndarhalgimenni hjá Oslo. Hann var í nærmastu ætt við Ólav tann heilaga, og teir livdu um somu tíð. 16. mai verður í Noregi kallaður St. Hallvardsdagur.

St. Hallvards-heiðursmerki er latin síðani 1956 og sum oftast eru tað kendir politikkarar, ítróttarfólk ella listarfólk sum hava fingið hendan heiður.

Erna arbeiðir framvegis í Urtegata, meðan Njál nú er tíðindastjóri fyri Frelsunarherin í Noregi, Føroyum og Íslandi.

Tá Njál hevur stundir, hjálpir hann til í Urtegata, har hann vaskar gólv, er duravørður ella ansar eftir, at alt er, sum tað skal við teimum, sum støkka inn á gólvið.

- Allir stjórar skuldu sloppið at vaskað gólv av og á. Tað høvdu teir havt gott av, heldur Njál.

## Eitt handaband

At Oslo kommuna velur at geva einum føroyskum hjúnum hægsta heiður frá býnum taka tey til sín við takksemi, men tey ynskja ikki at taka allan heiðurin sjálv.

- Vit eru ikki farin inn í hetta arbeiðið fyri at fáa heiðurslønir og virðislønir. Tað ber ikki til, tí so kundu vit ikki gjørt nakað í gerandisdegnum.

– Vit høvdu heldur ikki kunnað gjørt tað, vit hava gjørt, uttan hjálp frá øllum teimum tíggjutals, sum eru við til at fáa gerandisdagin at mala runt í Urtegata, sigur Njál Djurhuus.

Hann sigur, at ein heiður sum hesin er góður at fáa, tí hann vísir, at fólk uttan fyri Frelsunarherin geva tær ans og ynskja at takka tær fyri tað arbeiði, tú gert.

- Tað er gott at vita, at politikkararnir í Oslo vilja vísa okkum ein slíkan heiður, og ikki minst at tey vísa, at tey eru glað fyri tað arbeiðið, vit gera á gøtuni. Eg síggi hesa heiðursløn sum eitt handaband til tann felagsskapin, sum vit arbeiða fyri.

Frelsunarherurin byrjaði virksemi sítt millum illa stødd í Oslo, tá býurin kallaðist Christiania fyri meir enn 100 árum síðani.



**Mynd: Vårt Land**

## Eg eri føroyingur

- Eg umboði Várharra og Frelsunarherin; men líka týdningarmikið er, at eg umboði Føroyar og føroyingar. Tað er mín uppruni sum føroyingur, sum hevur gjørt meg til tað, eg eri í dag, sigur Njál.

Oslo heldur í ár 1000 ára føðingardag, og ein hópur av tiltøkum fara fram í býnum gjøgnum alt árið.

Fyri Njál og Ernu er tað tó ein serlig hending, sum tey eru farin at gleða seg serliga til.

- Til jólar fær Frelsunarherurin ein spildurnýggjan buss, sum vit skulu brúka til at koma út millum fólk við og til at koyra runt í Oslo fyri at geva fólki, sum treingja mat, sigur Njál.

Tað er við einum ávísum stoltleika, at hann fortelur um hendan bussin. Í nøkur ár hevur herurin havt ein gamlan buss, og hesin er nú so útslitin at nógvir pengar skulu búkast til at fáa hann í stand aftur. Hesum hava Njál og Erna verið klár yvir leingi, og tí hevur verið roynt at sett pengar av til at keypa nýggjan buss.

- Vit byrjaðu at leggja pengar til síðis aftan á, at vit høvdu vitjað á oljupallinum, Snorre, fyri fimm-seks árum síðani. Tá fekk Frelsunarherurin 150.000 krónur. Hetta fór inn á eina konto, sum vit ynsktu skuldi brúkast til nýggjan buss.

Tá Njál seinasta heyst fekk nýtt starv, vóru umleið 800.000 krónur á bankabókini, og nýggjur bussur kostar 1,8 milliónir.

- Tað ergraði meg eitt sindur, at vit ikki vóru komin á mál. Men nú ein dagin fekk eg telefonboð frá einum kendum norskum vinnulívsmanni. Hann hevði hoyrt um bussætlanina og hevði ringt til nakrar múgvandi vinmenn, og hesir hava nú givið okkum tær umleið 800.000 krónurnar, sum í restaðu.

– Í komandi viku rokni eg við, at vit kunnu bíleggja ein nýggjan Volvo-buss, sum skal standa klárur, tá vit nærkast jólum, sigur Njál Djurhuus at enda.